Fylgiskjal 21

umhvørvisstovan

## Heilsu- og innlendismálaráðið

Argir, hin 4. juni 2018
Málsnr.: 18/00298-3
Tykkara málsnr.: 17/00872
Málsviðgeri: Petur Nielsen

**Hoyringarsvar frá Umhvørvisstovuni um uppskot til náttúrumargfeldislóg.**

### 1. Yvirskipaðar viðmerkingar

Ein dagføring av lógargrundarlagnum og fyrisitingini á náttúru- og lendisøkinum er tiltrongd, og tað er í tøkum tíma, at hetta verður gjørt. Tí fegnast Umhvørvisstovan um, at náttúrutilfeingið, og hvussu farið verður um og við náttúruni, nú miðvíst verða viðgjørt, og nútímans fyrisitingarligir karmar skaptir til tess at tryggja margfeldið í føroysku náttúruni, grundað á almenn og altjóða faklig og fyrisitingarlig ástøði og sjónarmið.

Uppskotið til náttúrumargfeldislóg er helst nýbrot í føroyskari lóggávu. Uppskotið er sera umfatandi og kann tykjast møtimikið, men Umhvørvisstovan heldur yvirskipað, at lógin, verður hon samtykt, fer at vera eitt gott amboð at fyrisita og verja um føroysku náttúruna.

### 2. Rammalóg

Lógin er í stóran mun ein rammulóg. Karmar - hugburður, um tú vilt - sum skulu takast við í viðgerðini, og sum atlit skulu takast at, tá átøk og virksemi, sum mangan eru regulerað í øðrum lógum, verða fyriskipað og verksett.

Ivaleyst verður tað ein avbjóðing at fáa nógva kunngerðarsmíðið, sum er ein fortreyt fyri, at lógin skal fáa ætlaða virknaðin, frá hondini. Tað sama er galdandi fyri tað umfatandi skrásetingararbeiðið og savnan av vitan um náttúruna, sum - fyri so vítt leyst av hesari lógini - skal gerast. Tí verður tað ikki ein fullfíggjað skipan, sum verður verksett tann dagin lógin verður sett í gildi, men ein tilgongd, sum alt eftir hvørjar ressursir fyrisitingin hevur at arbeiða við, fer at taka tíð - ár - at byggja upp. Talan er um nýtt arbeiðlag og mannagongdir, sum skulu mennast, roynast í verki og mýkjast.

Uppskotið er skrivað yvir norskan leist, og tí er vert at hyggja at norsku royndunum, nú norska lógin hevur virkað í skjótt 10 ár.

Margfeldisfyrisitingin verður ætlandi løgd til Umhvørvisstovuna, men tað verður eyðvitað bæði ynskiligt og neyðugt, at aðrir stovnar og myndugleikar eisini spaða til, kanska serliga viðvíkjandi vitanargrundarlagnum. Somuleiðis fer ein vælvirkandi fyrisiting støðugt at hava fyri neyðini at útvega

sær dátur og greiningar frá ráðgevum og feløgum, og slíkt skal rúm vera fyri innan árligu játtanarkarmarnar.

Náttúrumargfeldislógin kann ikki standa einsamøll, og tað er avgerandi neyðugt, at hon verður fylgd upp og styðjað av aðrari lóggávu og kanska mest av øllum einari nýggjari lóg um lendisplanlegging – eini dagførdari planlóg at koma í staðin fyri gomlu býarskiparlógina (Ll 13/1954).

Jarðarbrúk og aldargamalt seyðahald hevur merkt - og fer framhaldandi at merkja - lendið og náttúruna, og nærum eingin blettur í landinum er heilt órørdur av manna ávum. Sama er við sundum og firðum, har útbyggingar, útlát, ferðsla og ikki minst alivinnan brúkar og setir síni spor á sjógv og náttúru.

Umhvørvisstovan viðurkennir grundsjónarmiðini um, at náttúra okkara er broytilig og broytist, og at menniskjaligt virksemi, sum nevnt omanfyri - men eisini tað at lata standa til – hevur ávirkan á javnvágina í náttúruni.

Við náttúrumargfeldislógini fáa vit góð amboð at tryggja, at átøk og virksemi verða skipað við neyðugum og skynsomum atliti at vernd av lendi og náttúru. Tað verður ikki gjørt eftir einum degi, og tað krevjast munagóðar og áhaldandi íløgur í manning, førleikar og dátugrundarlag, men við lógini verður grundarlagið lagt.

Seinastu 15 árini hava eini tríggjar-fýra royndir verið gjørdar at dagføra náttúruumsitingina. Í øllum førum er miðað eftir at flyta fyrisitingina frá friðing til vernd. Hesi átøk bóru ikki á mál. Nú verður lagt til brots heilt øðrvísi við uppskoti, skrivað við fyrimynd í norskari lóg um náttúrumargfeldi.

At norskur leistur er valdur kann tykjast fremmant og avbjóðandi, tí norska lógin er umfatandi, setir stór krøv til uppfylgjandi kunngerðarsmíð og grundleggjandi byggir á aðra fyrisitingarliga og løgfrøðiliga siðvenju.

Uttan mun til, hvør fyrimynd er brúkt, verður avbjóðingin at laga nýggju skipanina til føroyska náttúru og føroyska fyrisiting. At leggja seg eftir einum so umfatandi skipan ger ikki uppgávuna minni møtimikla.

Tað er tí átroðkandi neyðugt at avvarðandi myndugleikar gera langtíðarætlan fyri, hvussu lógarverk og fyrisitingarlig skipan skal setast í verk og fíggjast.

Hyggja vit at grannalondunum - og kanska serliga at Norra, sum nú síðani 2009 hevur virkað undir líknandi lógarkørmur – sæst, at sentralir og regionalir myndugleikar hava stóran leiklut í fyrisitingini á umhvørvis- og náttúruøkjunum. Margfeldislógin verður í stóran mun umsitin av fylkesmonnunum og miljødirektorat'inum.

Regionala liðið hava vit ikki í Føroyum, og málaráðini hava meiri eftirlits- og kæruviðgerðir um hendir, meðan dagliga fyrisitingin her liggur á stovnunum - í hesum føri ætlandi á Umhvørvisstovuni.

Hetta er ein stór uppgáva og stórar avbjóðingar at leggja á stovnin. Neyðugt er við munagóðari játtan til at seta nýtt fólk, alsamt at menna starvfólk og at fáa til vega og skipa skrásetingar og náttúrudátugrunnar.

Aðrir stovnar hava eyðvitað holla vitan, førleikar og upplýsingar, sum eiga at verða troyttir margfeldinum at gagni. Hetta sjálvandi í tann mun, teir ikki longu verða tað. Hugsað verður m.a. um Tjóðsavnið, Jarðfeingi, Havstovuna og Fróðskaparsetrið. Eisini her má raðfestast og neyðugt tilfeingið gerast tøkt.

Sera týðandi er at sleppa undan, at fleiri gera sama arbeiði og handfara somu dátur. Tí er eyðvitað neyðugt, at vit vita av hvørjum øðrum, og at samstarv um atgongd til dátugrundarlagið verður samskipað upp á tvørs av málsøkjum og stovnum. Ivaleyst kunnu partar av málviðgerðini hentari gerast aðrastaðni enn á Umhvørvisstovuni, og eisini hetta má samskipast.

Ein týðandi liður verður at útgera og menna kommunalu fyrisitingarnar at taka við og verkseta aðalmál og -mið og at seta krøv í mun til margfeldislógina.

Sambært almennu viðmerkingunum til lógaruppskotið verður mælt til at luta Umhvørvisstovuni trý akademisk størv at taka sær av fyrisitingini av lógini umframt skráseting av føroysku náttúruni, men at sum frá líður verður tørvurin størri.

Í 2018 er 2,7 mió. kr. settar av á fíggjarlógini til eina nýggja náttúruumsiting á Umhvørvisstovuni, men ein partur skal brúkast til at fremja kunngerðina um rottutýning.

Í norska Miljødirektorat'inum verður uml. helmingurin av játtanin nýttur til umsiting av náttúru-margfeldislógini, meðan hin helvtin verður brúkt til at keypa vitanartænastur frá almennum sum privatum, til at kortleggja og skráseta náttúruna, meta um støðuna o.a.

Ivaleyst er hetta ein leistur at royna - og menna - eisini í Føroyum, og tí má árliga játtanin geva rúmd fyri hesum.

Spurt verður, um nøkur lýsing er gjørd av, hvønn leiklut verandi myndugleikar innan ymisk málsøki eru ætlaðir at hava í umsitingini av lógini og her verður hugsað um náttúru, jarðfrøði, landslag, siðsøgulig viðurskifti og onnur virði, sum sambært lógini verða flokkað sum náttúrumargfeldi.

Spurt verður eisini, um arbeiðsbólkurin hevur viðgjørt spurningin um onnur jarðbundin virði eru fevnd av lógini ella hugtakinum náttúrumargfeldi.

Her verður eitt nú hugsað um tøku av sandi, gróti, eyri, mold o.t., og um slík tøka, grevstur vm. kann roknast sum inntriv í náttúruna, og um hetta í fall skal metast eftir kap. 2.

Lógaruppskotið er í stóran mun ein rammulóg, skilt á tann hátt, at hon gevur landsstýrismanninum heimild at áseta kunngerðir um flestu viðurskifti, sum lógin regulerar og í øðrum førum at taka avgerðir.

Hetta hevur við sær, at lógin í sjálvum sær ikki skapar tað stóru náttúruverndina frá byrjan, tí verndin "byrjar" ikki, fyrr enn kunngerðir eru gjørdar á nógvum ymiskum økjum.

Kunngerðasmíðið er heilt avgerandi fyri virknaðin av lógin og kann á ongan hátt undirmetast. Tí er átroðkandi neyðugt at seta neyðugu orkuna at gera hesar kunngerðir skjótast gjørligt.

Spurt verður, um hetta er ein nøktandi tilgongd til náttúruvernd og ikki minst, tá hugsað verður um, hvussu lítil fyrisitingarlig starvsfólkaorka er til kunngerðasmíð. Tað er lítið at ivast í, at uttan kunngerðir verður lítil náttúruvernd fingin til vega við hesum lógaruppskotinum.

Brotið er upp úr nýggjum, lógaruppskotið er skrivað yvir annan leist enn vanligt, og bæði lóg og viðmerkingar eru rættiliga rúgvismikil.

Hoyringin er tí um nakað meiri týðandi enn annars.

Umhvørvisstovan heldur tí, at hoyringsumfarið av lógaruppskotinum hevur verið í so stutt.

Tað framgongur ikki serliga týðiliga í viðmerkingunum, hvørjar hugsanir arbeiðsbólkurin hevur havt til útinnandi myndugleikauppgávurnar, og tá serliga fyrisitingar- og eftirlitspartin.

Fyrisitingarliga uppgávan er stór, og hetta átti at verið viðgjørt meiri ítøkiliga í viðmerkingunum.

Uppskotið til náttúrumargfeldislóg er heilt serstakt á tann hátt, at umframt at verða ein rammulóg, hevur lógin eisini víðfevnandi reglur um, hvussu mál av ymsum slag skulu handfarast frá tí tey verður reist og til tey eru liðugt viðgjørd, avgjørd og kunngjørd.

Reglur, sum í summum førum eru tær somu, sum longu eru ásettar í galdandi fyrisitingarlóg, meðan aðrar reglur fara enn longur og áseta, júst hvussu ein myndugleiki skal samskifta við áhugapartar, hvørjar frágreiðingar skulu gerast, nær og hvussu lýsast skal alment o.s.fr.

Í grundini eitt bland av fyrisiting og lógarsmíði, har fyrireikandi myndugleikin ikki fær frælsi til at leggja sína málsviðgerð til rættis á ein fyri tað einstaka málið hóskandi hátt, tí mannagondin er lógarbundin.

Umhvørvisstovan heldur, at ráðið eigur at umhugsa, um hetta er skilagott, og um hetta egnar hetta seg til eina lítla fyrisiting, sum longu er bundin av fyrisitingarlógini, sum borgar fyri rættartrygd borgarans.

Drúgvu málsviðgerðarreglurnar í lógini binda málsføra myndugleikan til at viðgera øll mál á ein lógarfestan hátt - óansæð um talan er um stór ella smá mál.

Vandi er fyri, at øktar fyrisitingarligar byrður leingja um málsviðgerðartíðina, økja um fyrisitingarligu útreiðslurnar og skapa mótstøðu móti náttúrufyrisitingini millum manna.

Tí er tað er avgjørt ynskiligt, at málsgongdin gerst meira einføld og helst skjótari. Tá verður hon eisini betri egnað til føroyska samfelagið og ikki minst okkara fyrisitingarvenju.

## 3. Viðmerkingar í mun til viðarlundir, skógrøkt, plantuframleiðslu o.a.

Tað er trupult at síggja, júst hvørjar avleiðingar lógin fer at hava fyri træ- og urtagarðsplantur og tað menningar- og granskingararbeiði, sum Skógrøktin varðar av. Yvirskipað er uppskotið ikki sett í ein føroyskan kontekst. Ikki fyrr enn neyvari reglur eru skipaðar í kunngerð fer tað at bera betri til at meta um, hvørja ávirkan regluverkið kann fáa fyri virksemið hjá Skógrøktini.

Spurt verður, hví gomlu og nýggjaru viðarlundirnar als ikki nevndar í viðmerkingunum til lógina. Hetta tykist heldur løgið, tá eitt nú privatir urtagarðar eru nevndir. Tað er eisini áhugavert í lógini at vísa á,

hvat munurin millum grasagarðar, viðarlundir og onnur velt øki og geirar eru, har antin privat, landið ella kommunan hava ræðisrætt. Hetta kann fáa týdning í umsitingini av ymsum málum.

Í mun til landsløg kann tað sigast, at tað í høvuðsheitum finnast trý sløg í Føroyum: Náttúrulandslag, røktarlandslag og býarlandsløg, eitt nú kolonihavar, grasagarðar, urtagarðar o.t.

Tá ræður um viðarlundir verður hildið, at lógin kann verða eitt gott útgangsstøði hjá myndugleikanum at kortleggja øki, sum eru egnaði til viðarlundir og sum ikki gera seg inn á náttúruvirði, sum eiga at vera vard eftir lógini. Tað er eisini upplagt, at øki verða løgd av til viðarlundir í samstarvi við økisplanleggingina hjá kommununum - bæði nú og tá planlóggávan er dagførd.

Tað er jú ávís føroysk framleiðsla og gransking innan ymisk øki, eitt nú royndarstøðin hjá Búnaðarstovuni, Veltan í Sandoynni og ymiskir gartnarar, sum dyrka plantur. Tað er ein sjálvfylgja at framleiðarar mugu koma undir ávísa ábyrgd og skyldir, og spurningurin er, um lógaruppskotið fevnir um hetta virksemið, ella bara um útseting av slíkari framleiðslu.

Viðvíkjandi økisvernd er tað hvørki lætt ella einfalt at finna fakliga semju um val og flokking av økjum, tí kvalitetsnormarnir kunnu vera so ymiskir. Verkætlanin við eini Náttúrulund er dømi um hetta. Tað verður ein stór avbjóðing bara at áseta kvalitetsnormarnar, og hvør myndugleiki skal varða av tí.

Hildið verður, at lógaruppskotið áleggur myndugleikum og framleiðarum stór skjalfestingarkrøv í mun til vitanargrundarlag og flokking av trævøkstri og plantum.

Spurningurin er, hvør myndugleiki hevur definitiónsrættin.

Somu avbjóðingar kunnu vísa seg í mun til meting av fremmandum sløgum. Tað er umráðandi at finna eina eintýðuga skipan fyri flokking av fremmandum sløgum, so tað ikki verður tilvildin, sum ræður.

Spurt verður eisini, um hugtakið fremmand sløg er heppið at brúka. Kanska 'ikki upprunalig', ella 'ikki heimahoyrandi' - á enskum "non-native" - kundi verið meira neutral og beinrakið. Hugtøk sum innflutt og innsløðd sløg úr "Føroya Náttúra" kunnu eisini umhugsast.

Tá kunngerðareglur um at avmarka innflutning av plantum og trøum verða gjørdar, kann Umhvørvisstovan øðrumegin hava ein áhuga í at seta strong krøv at verja náttúruna og hinumegin hava áhuga í at gera royndir og granska í, hvørjir vøkstir egna seg til ymisk sløg av planting og útseting til ymisk endamál, almenn sum privat.

## 4. Viðmerkingar í mun til umhvørvisgransking

Tað er umráðandi, at javnvág er millum at varðveita náttúruvirði og møguleika hjá menniskjum at liva, menna samfelagið og gera inntriv. Í mun til hugtakið at varðveita, eigur tað at vera in mente, at náttúran í sær sjálvari er dýnamisk og broytilig, og at náttúran og vistskipanir laga seg til broyttar umstøður, bæði tær náttúrugivnu umstøðurnar og inntriv og ávirkan av mannahond. Tað er umráðandi ikki at oyða ta náttúru, vit hava, og fokus eigur at verða lagt á at spjaða vitan um okkara náttúru.

Mett verður, at áhugi og fyrilit fyri náttúruni veksur natúrliga fram í huganum á fólki, sum ferðast í náttúruni. Tí eigur atgongd til náttúruna at verða so frí sum gjørligt, so tokki til og við tí umhugnsi fyri

náttúnuni og tí sum í henni livur og er, kann vaksa og trívast í mannahuganum. Hetta kann stuðlast við, at tað verður vanligt hjá familjum, barnagørðum, skúlaflokkum, arbeiðsplássum o.t. at fara út í náttúruna at hugna sær/sum rekreatión. Alment bann ímóti at ferðast í náttúruni uttan fyri bygdagøtur er ikki mennandi fyri eina slíka tilgongd.

Ynskiligt er tí, at allmannarætturin verður staðfestur í lógini. Hetta kann kanska skoytast upp í § 6.

Hildið verður eisini, at tað er neyðugt at skilja millum inntriv og vanliga ferðslu, har fólk eru til gongu í náttúruni. Spurt verður, um tað at "fara fram við varsemi" í grein 6 bæði kann fevna um at ganga túr í haganum og so til dømis at spreingja Glyvursnes.

## 5. Onnur viðurskifti

Umhvørvisstovan heldur, at tað er umráðandi at staðfesta, at serstakliga kap. 2 í lógini er galdandi fyri alt virksemi og á øllum regulerendi stigum.

Eitt nú mugu viðmerkingarnar til verklagslógir, sum eru heimild fyri almennum anleggum og byggingum, staðfesta, at inntrivini hava tikið atlit at kap. 2 í margfeldislógini:

- Fyrisitingarmið
- Almenn varsemisskylda
- Meginreglur fyri almennum avgerðum
    - Vitanargrundarlagið
    - Meginreglan um fyrivarni
    - Heildartrýstið á vistskipanina
    - Tann, sum varðar av virksemi, sum er umhvørvinum at skaða, ber kostnaðin
    - Umhvørvisgóð tøkni og rakstrarhættir
- Dygdarkrøv til náttúrumargfeldi
- Onnur týðandi samfelagsáhugamál

Umhvørvisstovan ivast í, um margfeldið fyri eitt nú síl og bleikju verður nóg væl vart við sjófeingislógini, tí at sera lítið ítøkiligt verður sagt í tí lógini um veiðu í áum og vøtnum.

Umhvørvisstovan metir, at tað í hesi lógini skal vera krav um vitanardeiling, so at øll tøk vitan um náttúruviðurskifti skal vera ókeypis atkomulig hjá myndugleikum, óansæð um vitanin er fingin til vega av almennum stovnum og myndugleikum, ella umsøkjarum, loyvishavum ella øðrum, sum virka sambært føroyskari lóggávu. Tað eigur rætt og slætt at vera lógarfest, at allar dátur um náttúru ókeypis skulu latast náttúrufyrisitingini av øðrum almennum, kommunalum sum interkommunalum felagsskapum og samstørvum, einstaklingum, feløgum, virkjum o.ø., so dáturnar kunnu koma øllum at gagni.

Umhvørvisstovan mælir til, at ráðið kannar norsku eftirmetingina av, hvussu tað hevur hilnast norðmonnum at fyrisita náttúrumargfeldislógina, og ikki minst, um staðfestingarnar eiga at geva orsøk til broytingar í hesum uppskotinum, áðrenn tað verður lagt fyri tingið.

Yvirskipað verður viðmerkt, at umsetingin av norska lógartekstinum kann vera heldur tung at skilja. Hugtøkini eru rund, bleyt og alheimsfevnandi ella universal.

Í føroysku umsetingini eru orð og hugtøk, sum ikki í nóg stóran mun eru "gradueraõ" ella stigskift til føroyska málið.

Dømi um slíkt orð er norska orðið "ivareta". Hetta er fyri mesta partin umsett til at varðveita, hóast spurnartekin kann setast við, um tað altíð er rætt.

Orðið "varðveita" kemur 13 ferðir fyri og í fimm av førunum verður "ivareta" týtt til "varðveita".

Norska bokmålsordboka sigur at "ivareta" er "at ta vare på" ella "at ta hånd om". Til enskt verður "ivareta" týtt til "attend to", "look after" ella "take care of". Veikari orð og merkingar enn at "varðveita".

Danska orðið "varetage" verður sambært Gyldendahl eisini týtt til hesi orðini og onnur við, alt eftir hvør bók verður brúkt. Gyldendahl JUR týðir til: " protect, safeguard, manage".

Umhvørvisstovan heldur, at tað er vert at umhugsa eina meira fjølbroytta týðing og ikki so einsíðugt at brúka hugtakið "varðveita".

Har viðurkend fakorð eru eitt nú í bókini "Føroya náttúra" eiga tey at verða brúkt.

## 6. Viðmerkingar til einstøku greinarnar

Til § 1

Spurt verður, hví rekreativ virði ikki eru nevnd, eins og t.d. í umhvørvisverndarlógini og havumhvørvisverndarlógini.

Eru hesi ikki fevnd av endamálinum ella liggur tað í øðrum hugtøkum?

Kundi okkurt ítøkiligt kanska verið sagt um rekrativ virði í serligu viðmerkingunum?

Hvat er føroysk náttúra ? Órørda náttúran er upprunin, meðan menniskjan við velting, bygging o.ø. ger seg inn á náttúruna. Burðadygg nýtsla og náttúruvernd í okkara høpi, má tí setast í rætta samanhangin.

Ein beinrakin lýsing av eyðkennunum við náttúruni í Føroyum kundi skapt betri forstáilsi fyri samanhanginum og andanum, sum lógin skal lesast og skiljast í.

Til § 2

Kanska tað er meira logiskt at nevna "løkir" áðrenn "áir". Hildið verður, henda raðfylgjan hongur betur saman 'uppi á landi'.

Til § 3, nr. 2

Spurt verður, hvussu leingi ymisk sløg skulu hava verið á staðnum ella í Føroyum fyri at kunna roknast sum ikki fremmand ella uppruna sløg.

Til § 3, nr. 17

Vistfrøðilig funktiónsøki kunnu kanska hóskandi umorðast til vistfrøðilig virkisøki. Tað ljóðar meira føroyskt.

Til § 4, stk. 1

Mælt verður til at broyta miðið, so inntriv av mannahond eru í fokus heldur enn broytingar av náttúru- og umhvørvisávum. At tað verður viðurkent, at náttúran í sjálvum sær er dýnamisk og broytilig. Í staðin kann miðast eftir, at mannavirksemi ikki beinir fyri náttúrumargfeldinum. Somuleiðis eigur lógin at tilskila, at man heldur ikki við mannainntrivum skal forða fyri natúrligum broytingum í náttúruni, tí slíkt virksemi er eisini eitt slag av inntrivi, um ein roynir at "varðveita" náttúrumargfeldið, sum stendur í natúrligari broyting. Vit eiga við øðrum orðum ikki at steðga íbygda dýnamikkinum í náttúruni, í vistskipanum o.s.fr.

Til § 5, stk. 1, 1. pkt.

Um tað við varðveiting verður hugsað at forða natúrligum broytingum í náttúruni, verður ásetingin kanska ov víðgongd, og kann fara at krevja ov nógv virkin verndar- og røktartiltøk, heldur enn lata náttúruna fáa frið

Til § 5, stk. 3

Spurt verður, um tað er allýst og avgjørt, júst hvørji tamd og vand sløg, talan er um at varðveita ílegurnar hjá.

Hvør hevur heimild at allýsa og seta orð á tað? Er hetta málsøki hjá t.d. Búnaðarstovuni?

Ásetingin kann eisini metast í mun til § 53 um ílegutilfar.

Til § 6

Kanska er § 6 er orðað ov generelt, og eigur at verða spískað til, so tað eru inntriv ella framferð í náttúruni, sum tað snýr seg um.

Í staðin fyri varsemisreglu kann umhugsast at kalla tað eina fyrlitsreglu – tað at taka fyrilit.

Til § 11

Kanska hugtakið at "fyribyrgja" kundi komið í staðin fyri "forða fyri".

Til § 12

Kanska "fyribyrgja" kundi komið í staðin fyri "sleppa undan".

Til § 15, stk. 1

Vanliga meginreglan í Føroyum er, at tað sum ikki er bannað ella avmarkað við lóg, tað er loyvt. Her verður meginreglan vend við. Hví tað?

Til § 16, stk. 1

Er ásetingin neyðug um øll veiða vanliga er regulerað við lóg, sum júst hevur egin krøv og avmarkingar? Er talan her ikki um dupultregulering og at blanda seg uppí málsøki hjá øðrum? Ella áleggur henda áseting eina nýggja meting niður yvir økismyndugleikar, sum eitt nú umsita veiðu av grágæs, fugli, haru, grind o.ø.? Hvørjar avleiðingar hevur ásetingin í mun til lunnindi, sum eitt nú bøndur hava sambært landbúnaðarlóggávuni?

Til § 16, stk. 4

Spurt verður, um haran er undantíkin.

Til § 18, stk. 4

Ásetingin kann misskiljast soleiðis, at gagnnýtsla úr sjónum ikki loyvd.

Nøkur ryggleys djór liva bæði á landi, í sjóvarmálanum og í sjónum. Hvussu við teimum?

Er tað ikki loyvt at taka krækling og stinga fliðu? Ella er slík tøka fevnt av sjófeingislógini?

§ 18, stk. 4 kann eisini skiljast at vera í andsøgn við gildisøki í § 2.

Spurt verður, hvussu § 18, stk. 4 skal skiljast.

Til § 20:

Skotið verður upp, at tillaga og gera ásetingina greiðari, so at fokus verður á ymisk sløg av ferðslu og tiltøkum, sum kunnu tørva neyvari regulering. Tað má verða munur á, um talan er um eitt nú motorrikin akfør, ella ross og fólk, sum ganga í lendinum ella - um farið verður út á sjógv ella vøtn - um motorriknir bátar, skip og vatnskutarar ella árabátar, kajakkir o.t. Ein graduering hevði tænt ásetingini væl og framt forstáilsi fyri, nær ein er innanfyri ella uttanfyri.

Til kap. 7 um ílegutilfar

Spurt verður, hví tað er umráðandi at staðfesta, at ílegutilfar úr plantutilfari, har øll virðisøkingin hendir aftan á, at ílegutilfarið er tikið úr - og har tað ikki eru sjálvar planturnar, sum verða heystaðar ár eftir ár - er ogn Føroya fólks.

Er talan ikki heldur um alramannaogn ella ogn hjá alheims¬búgvum? Hví skal nakar fáa "royalty-skatt" av, at onkur annar ger stórar íløgur í úrdráttir, sum byggja á ílegutilfar tikið úr føroysku náttúruni?

Virðisøkingin hendir í virðisketuni aftaná og uttan at skerja náttúrumargfeldið hjá okkum. Tykist løgið brádliga at taka patent uppá felagsogn og lívfrøðiligt tilfar í hesi lógini, samstundis sum onnur viðurskifti og inntriv í føroyska náttúrumargfeldið als ikki verður regulerað, sum t.d. tøka av sandi, gróti, eyri, mold o.a. ella rætturin at brúka sjóvarfall, vind, firðir og sund o.s.fr.

vinarliga

Petur Nielsen, stjóri